gult cyan magenta svart



# Útiseti vitjar aftur á klettarnar




*– Hesa vikuna hevur Anna Katrina Højgaard listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Um eg so standi mitt í einum urtagarði í Nyborg og máli, so mugu brimið og natúrkreftirnar í Føroyum við í málningin.

Nei, føroyska grundarlagið fornoktar seg ikki í listini hjá havnarkonuni, Onnu Katrinu Højgaard.

Seinastu árini hevur hon búð ov virkað á Flatlondum, og hesa tíðina hevur hon verið sjáldsamur gestur her heima.

Men nú er hon so heimafturkomin at hava listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík fyri fyrstu ferð í níggju ár

Men hetta er kortini langt í frá fyrstu ferð, at hon hevur havt framsýning, hvørki í Føroyum, ella í Nyborg, har hon býr. Framsýningin hjá Onnu Katrinu er fjølbroytt, tí hon hevur bæði oljumálningar, tekningar, vatnlitsmyndir og fotomyndir við. At eisini fotomyndir eru við er kanska ikki so undarligt, tí upprunaliga er Anna Katrin a Højgaard fotografur, men síðani hevur hon eisini gingið á Listaskúla í Danmark.

Íblástur til listaverkini fær hon nógva staðni frá, tí á framsýningini eru myndevni bæði úr Danmark, úr Niðurlondum av Korfu.

Men fremsta keldan til íblástur er kortini føroyska náttúran, tí hon hómast aftur í nógvum verkum, eisini teimum „útlendsku“.

– Um eg so standi mitt í einum urtagarði í Nyborg og máli, og onki síggi uttan trøð, so skal brim ella okkurt annað føroyskt sum oftast upp í myndina, sigur Anna Karina Højgaard.

Framsýningin hjá henni læt upp fríggjadagin og hon er opin í dag og í morgin afturat

Opið er ímillum klokkan tvey um dagin og klokkan níggju um kvøldið.

# Veðrið



**Fimmdagaforsøgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og támut, kanska sirm av og á. Eisini sólglottar og hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og fyrrapartin regn, annars sólglottar, men eisini mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 18 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men eisini mjørki í støðum. Hitin millum 17 og 20 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men eisini mjørkaflókar og hitin millum 16 og 20 stig. Sunnudagin andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og hitin millum 9 og 13 stig.




Kuldabrúgvin yvir Føroyar fer eystureftir, men hitabrúgvin í útsynning úr Íslandi verður við Føroyar hósmorgunin.




Hitabrúgvin við Føroyar fer í landnyrðing og hátrýstið yvir Írlandi breiðir seg móti Føroyum.




**Hitalagið mált frá 17./07. kl 06⁰⁰–18./07. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,4°C**
Minsti hiti máldur í juli: **0,4°** Mesti hiti máldur í juli: **20,2°**




Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 17./07. kl 6⁰⁰–18./07. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í juli: **19,5 mm**

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 12 |
| Ammassalik | 13 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 14 |
| Tórshavn | 15 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 19 |
| Tromsø | 17 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannahavn | 20 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 29 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 33 |
| New Dehli | – |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 15 |
| New York | 26 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | – |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 11 |

## Vestfalskyrrindi

15. juli: Mánin longst frá jørðini
16. juli: Fullmáni
24. juli: Seinna kvarter

Kelda: Skipalistin 2000

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/ Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. juli | 8.57 | 21.14 | 7.57 | 20.14 | 8.12 | 20.29 | 10.57 | 23.14 | 11.57 | – | 7.12 | 19.29 | 6.12 | 18.29 | 9.12 | 21.29 | 10.12 | 22.29 | 8.42 | 20.59 | 9.57 | 22.14 |
| 20. juli | 9.32 | 21.48 | 8.32 | 20.48 | 8.47 | 21.03 | 11.32 | 23.48 | 0.14 | 12.32 | 7.47 | 20.03 | 6.47 | 19.03 | 9.47 | 22.03 | 10.47 | 23.03 | 9.17 | 21.33 | 10.32 | 22.48 |
| 21. juli | 10.05 | 22.24 | 9.05 | 21.24 | 9.20 | 21.39 | – | 12.05 | 0.48 | 13.05 | 8.20 | 20.39 | 7.20 | 19.39 | 10.20 | 22.39 | 11.20 | 23.39 | 9.50 | 22.09 | 11.05 | 23.24 |
| 22. juli | 10.41 | 23.01 | 9.41 | 22.01 | 9.56 | 22.16 | 0.24 | 12.41 | 1.24 | 13.41 | 8.56 | 21.16 | 7.56 | 20.16 | 10.56 | 23.16 | 11.56 | – | 10.26 | 22.46 | 11.41 | – |

